# Heilsuvandi:

## Grind kann skaða heilsu tína!

**Vinaliga les hesar reglur. Tað er týdningarmikið, at tú veitst um skaðan, sum eitrandi dálking ger á grindahval og á menniskjuni, sum eta hval. Her er nýggjasta vitanin frá vísindaligari gransking, sum tú kanska ikki kennir til.**

**Henda vitan verður latin tær, so tú hevur tað neyðugu vitanina, tá tú skalt gera av, um tú framhaldandi skalt eta grind og spik. Vit vilja kunna teg um tær negativu fylgjur, hesin matur hevur fyri heilsu tína og heilsuna hjá børnum tínum.**

***Meira kunning fæst eisini við at vitja: www.grindahvalur.org.***

**Takk fyri.**



*'Eitrandi evni, ið hótta hvalin, eru nú eisini ein hóttan fyri fólkini, sum eta hvalin'*

© Ingi Sorensen

Í Føroyum hevur Pál Weihe, yvirlækni, í samstarvi við fleiri aðrar altjóða granskarar, nú í eini trý áratíggju  kannað dálkingarevni í blóðinum hjá føroyingum og samstundis kannað árinið á heilsuna av hesum evnum.  Við árunum eru fleiri ræðandi úrslit almannakunngjørd í altjóða vísindatíðarritum. Í roynd og veru vísa nýggjastu kanningarnar av vaksnum og børnum í Føroyum enn størri heilsuvanda við at eta dálkað tvøst og spik, enn vit áður hava vitað um. Tær vísa at:

- Kviksilvur hevur negativ árin á menningina av nervaskipanini hjá ófødda barninum.
- Hesi árin síggjast eisini seinni í uppvøkstrinum.
- Nýggjasta granskingin gevur ábendingar um, at hetta hevur við sær eitt varandi negativt árin á andsevnini, tí negativa árinið er enn til staðar hjá ungum vaksnum.
- Samband er millum nøgdina av kviksilvuri mált í nalvastronginum og hægri blóðtrýst hjá børnum.
- Dálkingarevni í spiki hava negativ árin á immunverjuna hjá børnum, tí tey tálma virknaðin av barnakoppsetingum. Tað kundi týtt uppá, at immunverjan er undir fargi.
- Vandin fyri at fáa Parkinson er størri hjá teimum, sum siga seg hava etið nógva grind sum vaksin
- Vandin fyri høgum blóðtrýsti er størri.
- Samanhangur er millum typu 2 diabetes og tá grindahvalur hevur verið ein partur av kostinum serliga í  barnaárunum og í uppvøkstrinum.

**Fyri at umganga dálkingarevni í kostinum, mást tú hava í huga at:**

- **Tvøst er størsta keldan til kviksilvur hjá føroyingum.**
- **Fiskur úr havinum, sum føroyingar vanliga eta, inniheldur lítið av kviksilvuri.**
- **Tvøst og spik frá grindahvali eigur ikki longur at verða etið.**
- **At eta fisk í staðin fyri tvøst og spik verður staðiliga viðmælt sum partur av einum heilsugóðum kosti.**

## EITRAÐIR HVALIR MERKIR EITRAÐI FÓLK

Grindahvalurin hevur havt stóran týdning fyri føroyingar. Sum føðsluríkt kosttilfeingi hevur hann verið við til at veita góða heilsu og forða fyri hungursneyð í nógvum húsarhaldum gjøgnum tíðirnar. Men nú er grindahvalurin hóttur av einari eitrandi blanding av ídnaðarligum dálkingarevnum, sum eitra høvini og harvið okkara kosttilfeingi. Hesi eiturevni taka langa tíð at verða niðurbrotin í náttúruni, hópast upp gjøgnum føðiketuna og soleiðis eisini í grindahvali, sum er í toppinum av føðiketuni.  Samband er funnið millum eiturevni sum t.d. kviksilvur og seint niðurbrótilig lívrunnin dálkingarevni (Persistent Organic Pollutants ella POP'ir) og negativ árin á heilsuna hjá fólki, m.a. skaða á heilan og hesi evni kunnu eisini skaða immunverjuna.

Meðan lítið hevur verið tosað um, hvørja ávirkan hesi eiturevni hava á grindahvalin, vísir gransking í Føroyum, at mongdirnar av kviksilvuri í hvalunum eru nóg stórar til at skaða hvalin. Onnur vísindalig gransking hevur víst á skaðiligu árinini, sum tey mongu ídnaðarligu dálkingarevnini í náttúruni, hava á súgdjór í havinum. Til dømis:

- Á Svalbard hava 1,5% av ísbjarnahonunum lutvíst mannlig kynsgøgn.
- Í Eysturgrønlandi lýða ísbjarnir av beinbroyskni, t.v.s. niðursettum tættleika í beinagrindini og minkandi kynsgøgnum.
- Í evropeiskum høvum er samband millum dálkingarevni og nøringarbrek hjá nísu, bóghvítuhvali og hvessingi.

Hesi evni talan er um, eru PCB'ir (polychlorinated biphenyls), týningarevni so sum DDT (Dichlorodiphenyltrichloroethane) og Polycycliskt  Aromatiskt Hydrocarbonir (PAH'ir), sum koma burturúr brenning av olju og koli. Hesi eiturevni saman við øðrum  dálkingarevnum, so sum fluorsambindingar og bromeraði eldtálmandi evni, sum eitt nú verða brúkt til at viðgera møblar,

dálka øll føðiketuna í havinum. Harafturat eru tungmetallir so sum kadmium, blýggj og kviksilvur. Øll hesi eiturevni hópast upp í føðiketuni til súgdjórini í havinum, so sum grindahvalin og síðan til fólkið, sum etur hvalin.

*Hetta er orsøkin til, at Landslæknin, Høgni Debes Joensen og Pál Weihe, yvirlækni á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í 2008 ávaraðu um, at grindahvalur ikki longur var egnaður sum mannaføði.*




Vandamikil dálkingarevni í havinum hópast upp gjøgnum føðiketuna og eru sostatt ein hóttan móti hvalinum og móti fólki, sum eta hvalin

## MINKAR DÁLKINGARVANDIN?

Nei, tíverri. Nøgdin av kviksilvuri í havinum er ikki lækkað. Hjá ísbjarnum er kviksilvurmongdin í hári nú umleið 10 ferðir hægri enn áður. Eitrandi týningarevni sum t.d. DDT verða enn brúkt í øðrum pørtum av heiminum og nýggj sambond sum t.d. lívrunnin fluoreraði sambond verða funnin í hægri nøgdum í blóðroyndum hjá teimum, sum eta grindahval[1].

Royndir, tiknar av grindahvali seinastu 30 árini við Føroyar, vísa, at innihaldið av kviksilvuri er ikki minkað stórvegis. Tó er nøgdin av PCB'um og DDT í spiki lækkað í tráð við herdar avmarkingar av loyvdu nýtsluni runt um heimin. Hóast hetta, vísa nýggjastu mátingarnar, at kviksilvurinnihaldið í grindahvali er enn høgt og spikið inniheldur enn høgar nøgdir av fleiri seint niðurbrótiligum lívrunnum sambondum (persistent organic compounds) so sum PCB'um og DDE týningarevnum.

Læknafrøðilig gransking her í Føroyum hevur havt við sær, at vit nú vita nógv meira um tey árin, hesi eiturevni hava á menniskju, enn á grindahvalin.

*Keðiligi sannleikin er, at tvøst og spik av grindahvali er ikki longur heilsuberandi kostur, men er nú heldur ein hóttan móti fólkaheilsuni.*

## VIT HAVA EITT VAL

Føroyingar eiga ikki skyld í havdálkingini, sum hóttir grindahvalin og aldargamla føroyska lívsháttin. Hinvegin, hevur føroysk gransking verið við til at varpa ljós á og eigur lut í, at fokus nú er sett á ta globalu hóttan, henda dálking hevur við sær. Eins og  onnur lond hava sett tiltøk í verk fyri at minka um hóttanina móti fólkaheilsuni við at avmarka kviksilvur og onnur eiturevni í kostinum, mugu føroyingar eisini viðurkenna vandan og gera nakað munagott við hann. Føroyskar barnakonur hava gjørt nakað munagott og hava etið væl minni av tvøsti og spiki seinastu trý ártíggjuni, og tað sæst aftur, tí nú er munandi minni av eiturevnum í teirra blóði.

[1] (Int J Circumpolar Health. 2012; Dietary recommendations regarding pilot whale meat and blubber in the Faroe Islands Pál Weihe1,* and Høgni Debes Joensen[2])

## ER TAÐ YVIRHØVUR TRYGT AT ETA GRINDAHVAL?

Tá føroyingar hvørt ár veiða nakrar hundrað grindahvalir, ger tað, at stórar nøgdir av eitraðum mati er í umfari, og um alt verður etið, er tað nógv meira enn sjálvt matvørumyndugleikin í Føroyum hevur mælt til. Við at drepa so nógva grind og býta hana til húskini, taka vit ikki atlit til nýggjastu vísindaligu granskingarúrslitini, sum avgjørt stuðla undir tilmælinum frá Landslæknanum og Pál Weihe, yvirlækna, at tað ikki longur er ráðiligt at eta grindahval. Hóast vit hava sæð, at føroyskar barnakonur nú hava nógv lægri virðir av dálkingarevnum í blóðinum takkað verið fólkaheilsuviðmælum, er tørvur á fleiri átøkum fyri at verja framtíðar fólkaheilsuna.

*Tað er ikki rímiligt at drepa nógvan grindahval hvørt ár, og harvið fylla tunnur og frystiboksir við stórum nøgdum av illa eitraðum tvøsti og spiki. Við at halda grind til, eggja vit fólki til at eta beint ímóti vísindaligum og læknafrøðiligum viðmælum.*

## HVAT KANN MAN ETA Í STAÐIN FYRI GRINDAHVAL?

Øll tey føðsluevnini í tvøsti og spiki frá grindahvali, sum hava verið partur av tí heilsugóða føroyska kostinum, kunnu vit eisini fáa við at eta nógvan fisk so sum tosk og hýsu; alilaks, sild, svartkjaft og makrel. Fleiri av hesum fiskasløgum innihalda nógvar fleirómettaðar fitisýrur og lívsneyðugar vitaminir og mineralir so sum selenium.

*Tað verður avgjørt viðmælt at eta meira fisk heldur enn at eta grindahval fyri at varðveita eina góða heilsu og fyri heilsuna hjá børnum okkara.*

**Sir David Attenborough: BBC sjónvarpsvertur og rithøvundur, London**
*"Grindadrápið hevur hjálpt føroyingum at yvirliva í einum harðum náttúruumhvørvi í óteljandi ættarlið, men sama eitrið, sum hóttir hvalirnar hóttir nú eisini fólkini, ið eta teir. Føroyingum nýtast ikki at slíta serliga sambandið við grindahvalin, men heldur at umdefinera tað: Hugtakandi djórini kunnu halda fram við at hava virði fyri føroyingar gjøgnum hvalaferðavinnu, heldur enn sum matvøra, á ein hátt, sum kann lívbjarga bæði hvalum og føroyingum langt inn í framtíðina."*

**Pál Weihe, yvirlækni og leiðari av Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu**
*"Mín vón er, at hetta stóra offur hjá føroyska fólkinum at gevast við at eta henda siðbundna mat, kann verða brúkt sum ein boðskapur til restina av verðini um, at vit skulu verja okkara høv betur. Tí um føroysk børn og vaksin hava fingið mein av hesum dálkingarevnum, kann tað væl hugsast, at eisini t.d. heilsan hjá súgdjórunum í havinum er ávirkað".*

**Rúni Nielsen: Matvørutrygdarráðgevi og umhvørvisverndarfólk**
*"Framtíðin hjá Føroya fólki er treytað av einum heilsugóðum kosti og tíverri kann grindahvalur ikki longur vera partur av honum. Vísindaligu prógvini og læknafrøðilig gransking vísa okkum klárt á veg. Tað er ikki rætt at drepa fleiri hvalir hvørt ár, sum vit ikki eiga at eta. Um vit ynskja eina sunna føroyska tjóð, mugu vit viðurkenna fakta og eta nógv meira fisk, ikki hval".*

**Fyri at umganga dálkingarevni í kostinum, mást tú hava í huga at:**

- **Tvøst er størsta keldan til kviksilvur hjá føroyingum.**
- **Fiskur úr havinum, sum føroyingar vanliga eta, inniheldur lítið av kviksilvuri.**
- **Tvøst og spik frá grindahvali eigur ikki longur at verða etið.**
- **At eta fisk í staðin fyri tvøst og spik verður staðiliga viðmælt sum partur av einum heilsugóðum kosti.**

**Hetta rit er frá Grindahvalur, sum er ein ensk-føroyskur "non-profit" felagskapur, ið hevur til endamáls at veita óheftar, dagførdar, vísindaliga-grundaðar upplýsingar um grindahval, eitrandi dálking og fólkaheilsu.**
**www.grindahvalur.org**

**Samband: Rúni Nielsen, (Føroyar): cruisarin@gmail.com Tlf: + 298 591667**
**Andy Ottaway, (UK): info@grindahvalur.org Tlf: + 44 1273 515416**